## Irakar krevja vald

Tað serliga stjórnarráðið, sum amerikanarar hava sett í Irak, vil nú hava størri vald, men tað ætlar amerikanska stjórnin ikki at geva ráðnum.

Formaðurin í stjórnarráðnum, Ahmed Chalabi, sigur við New York Times, at stjórnarráðið vil hava fult ræði á fleiri irakskum ráðharrastovum, og hann ger samstundis greitt, at ráðið er ímóti, at fleiri fremmandir hermenn koma til Irak. Tvørturímóti eigur USA at fara undir at taka sínar hermenn úr landinum, sigur Ahmed Chalabi.

Men tað kemur ikki upp á tal. Samskiftisstjórin í Hvítu Húsunum, Dan Bartlett, sigur við New York Times, at USA fer ikki at lata teir 25 limirnar í stjórnarráðnum yvirtaka valdið í Irak. Í fyrra lagi er ráðið ikki fólkavalt, og harafturat er tað alt ov tíðliga at lata irakum valdið í landinum, sigur Dan Bartlett.

## Nógvir nýggj niðursetufólk

Ein kanning í Ísrael vísir, at talið á jødiskum niðursetufólkum á Vestara Áarbakka er vaksið nógv skjótari enn fólkatalið í Ísrael annars tey seinnu árini.

Sambært kanningini er fólkatalið í Ísrael vaksið 32 prosent síðani 1993, men í sama tíðarskeiði er jødiska fólkatalið á Vestara Áarbakka vaksið heili 144 prosent, skrivar Jerusalem Post, sum hevur gjørt kanningina. Blaðið skrivar, at seinastu trý árini er fólkatalið í Ísrael vaksið 6,8 prosent, men á Vestara Áarbakka eru jødisku niðursetufólkini vorðin 20 prosent fleiri í tali hesi trý árini. Seinasta ársskifti búðu 213.000 ísraelsmenn á Vestara Áarbakka, og tað svarar til 3,2 prosent av almenna ísraelska fólkatalinum.

Altjóða samfelagið hevur fleiri ferðir fordømt ísraelsku avgerðina at lata jødar seta búgv á Vestara Áarbakka, sum sambært Oslo-sáttmálanum frá 1993 er palestinskt øki. Sambært altjóða samfelagnum eru júst niðursetubygdirnar ein tann størsta forðingin fyri varandi friði millum ísraelsmenn og palestinar.

## Øði um lán

Andstøðan í Turkalandi er í øðini um eitt lán, sum stjórnin hevur fingið úr USA, tí andstøðan vil vera við, at stjórnin hevur sett landsins uttanríkispolitikk í veð fyri láninum.

Amerikanski fíggjarmálaráðharrin, John Snow, segði seinasta mánadag, at lánið til turkisku stjórnina verður útgoldið, um amerikanska uttanríkisráðið og verjumálaráðið Pentagon koma til ta niðurstøðu, at turkiski stuðulin til amerikanska politikkin í Irak er nóg stórur.

Tað er hetta, sum hevur fingið øði í turkisku andstøðuna. Emi Serin, sum fyri stuttum tók seg burtur úr stjórnarflokkinum hjá Tayyip Erdogan, forsætisráðharra, sigur við CNN, at stjórnin hevur selt landsins uttanríkispolitikk. Nær hava vit nakrantíð hoyrt, at hernaðarmyndugleikarnir í einum landi skulu góðkenna treytirnar fyri einum láni til annað land, spyr hann.

## Heitasta summar í 500 ár

Tað er ikki so løgið, at fólk siga seg ikki minnast so heitt summar sum í ár, tí nú siga granskarar í Sveits, at summarið í ár var tað heitasta í 500 ár.

Granskararnir siga seg vera komnar eftir, at meðalhitin í Evropa var 19,5 stig í juni, juli og august, og at tað var tvey stig oman fyri meðalhitan í somu mánaðum í árunum frá 1901 til 1995. Sveitsisku granskararnir siga, at summarið í ár var heitari enn í metárinum 1757, og at gomul skjøl benda á, at vit skulu heili 500 ár aftur í søguna fyri at finna eitt heitari summar í Evropa.

Eins og aðrir granskarar vilja teir sveitsisku heldur ikki siga nakað beinleiðis um orsøkina til tann nógva hitan í summar, men teir siga seg kortini ikki ivast í, at tað sokallaða vakstrarhúsárinið er ein av orsøkunum.

# Svenska løgreglan á berum

**Alt bendir á, at maðurin, sum varð settur í samband við morðið á Onnu Lindh og varðhaldsfongslaður, sleppur leysur aftur í morgin.**

LINDH-MORÐIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nógv bendir á, at svenska løgreglan er um at koma í somu støðu, sum tá Olof Palme varð myrdur. Hon veit ikki, hvør myrdi uttanríkisráðharran, Onnu Lindh.

Løgreglan hevur verið tøtt sum fløskan ta seinastu vikuna, men sambært tíðindastovuni TT hevur løgreglan lítið og einki at ganga eftir í drápsmálinum. Tað einasta, sum er likið út frá løgregluni er, at hon leitar eftir drápsmanninum, og at tann 35 ára gamli maðurin, sum situr í varðhaldinum í Stockholm, er ikki tann einasti, sum verður kannaður í sambandi við morðið.

Løgreglan hevur seinastu dagarnar roynt at fáa staðfest, at maðurin í varðhaldinum er tann sami sum á myndunum frá upptøkutólunum í NK-handilshúsunum, har Anna Lindh varð myrd. Sambært Aftonbladet hava trý vitni sagt løgregluni, at talan er um sama mann, men eftir øllum at døma er hetta ikki nóg mikið.

Tað er í øllum førum ikki nóg mikið til at staðfesta, at tað var tann 35 ára gamli, sum stakk uttanríkisráðharran. Harafturat bendir alt á, at hvørki fingramerki ella DNA-royndir hava sett mannin í samband við morðið. Tí bendir alt á, at rætturin fer at lata tann 35 ára gamla leysan í morgin.

# Fríðrikur fær Mary



*Nú er tað vist: Einaferð í vár fer Fríðrikur krúnprinsur at gifta seg við avtsralsku Mary Donaldson*

**Nú nýtist dønum og kongstrúgvum føroyingum ikki at spyrja longur. Fríðrikur krúnprinsur fær Mary Donaldson.**

KONGSHÚSIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hóast tað hevur ligið í luftini leingi, er tað ikki greitt fyrr enn nú, at Fríðrikur krúnprinsur sleppur at gifta seg við avstralsku unnustu síni Mary Donaldson.

Í gjár kunngjørdi hóvið á Amalienborg, at Margretha drotning fer at boða stjórnini frá, at hon hevur játtað krúnprinsinum at gifta seg við Mary Donaldson. Tað hendir tann 8. oktober, og tá verða tey bæði trúlovað. Nær brúdleypið verður, er hinvegin ikki heilt greitt, men tey kongakønu í Keypmannahavn gita, at tað verður í apríl ella mai næsta ár.

Fríðrikur krúnprinsur er 35 ára gamal. Mary Donaldson er ættað av oynni Tasmania sunnan fyri Avstralia. Hon er 31 ára gomul. Mamma hennara doyði í 1995, og pápin, sum er professari í støddfrøði, er í løtuni gestalærari á lærda háskúlanum í Oxford í Onglandi.




